Mykines 100 ár:

# Hugnaligur føðingardagur í Føroyahúsinum



*Kendi danski journalisturin Vagn Steen var frásøgumaður á kvøldinum.*



*Ein partur av tiltakinum var samrøða millum Vagn Steen og Mikines savnaran Thorkil Mortensen Lava á myndini er eisini kona Thorkil.*



*Annika Hoydal undirhelt við yrkingum og sangum*

**100 ára føðingardagurin hjá S. J. Mikines varð ikki einans hildin í Føroyum. Rættiliga fitt av fólki var komið saman í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, tá føðingardagurin varð hildin, við framløgu, samrøðu, sangi og køkum**

HÁTÍÐARHALD
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Kendi danski journalisturin og rithøvundurin Vagn Steen helt áhugaverdan fyrilestur um kreppur í lívinum hjá Mikinesi. Hetta var sera áhugavert og serliga limaskapurin hjá Mikinesi í donsku nasistunum í tríati árunum fekk kenslurnar hjá onkrum at hitna, og eina løtu aftan á tiltakið var samrøtt heldur hvassliga um hetta. Vagn Steen nevndi í framløguni, at Mikines var limur í hesum felagskapi í ein dag. Men hetta var sambært læraranum og viðmerkjaranum Virgar Dalsgaard als ikki so, hann vísti á, at limaskapurin var væl longri enn ein dag.

## Føroyavinurin Vagn Steen

Vagn Steen er eitt kent andlit í donskum miðlum, men hevur við sínum áhuga í serliga fornnorrønum, fingið sera sterkan áhuga í útnorði. Hann hevur fingist nógv við viðurskiftið í hesum londum, og er ein veruligur Føroyavinur. Hann tyktist væl vitandi um Mikines, og fólk lótu væl at framløguni.

## Stórt myndasavn

Vagn Steen hevði somuleiðis samrøðu við Thorkil Mortensen Lava, ið man vera ein tann, ið hevur størsta savnið av myndum hjá Mikines.

Savnið hjá Thorkil Mortensen Lava telur 22 oljumálningar, ið hann hevur savnað saman eitt nú á uppboðssølum. Thorkil greiddi frá, at hann plagdi at bjóða til hann ikki tordi longur. Vanliga hevði hann eitt loft, men onkuntíð megnaði hann ikki at halda seg undir hetta.

Hann greiddi frá, at tá hann keypti fyrsta málningin, segði onkur við hann, at hesin kostaði meira enn ein fólkavognur. Men hann segði seg vera glaðari fyri Mikines málingin enn nakran fólkavogn, og málningurin gav honum enn gleði.

## Grindadrapið er yndismálningurin

Tann málningurin, ið Thorkil Mortensen Lava var allar fegnast um, var Grindadrápið. Men umframt henda málning vóru eisini nógvir aðrir, ið vóru sera flottir. Fleiri vóru málningar, ið vit vanliga ikki síggja. Meðan tiltakið var koyrdi myndaframløga, av teimum 22 oljumálningunum. Tú hoyrdi javnan eitt suff fara ígjøgnum áhoyrarnar, tá onkur serliga forkunnugur ella vakur málningur kom á skíggjan.

## Tøkniligir trupulleikar

Kvøldið byrjaði eitt sindur rokaliga, uppvørpan hjá Føroya Húsinum og teldan hjá dóttur Vagn Steen vildu ikki tosað saman, tískil prýddi ein mynd av Orlando Bloom stórskíggjan fyrstu løtuna, men myndamaðurin hjá Sosialinum var kvikur at hjálpa og fekk myndafrásøgnina í gongd.

## Hungaligur endi

Kvøldið endaði hugnaligt við, at Annika Hoydal læs yrkingar hjá Carl Johan Jensen upp. Talan var um yrkingar úr Tímar og rek. Hetta vóru yrkingarnar um flugurnar hjá Mikinesi. Hetta savnið hjá Carl Johan Jensen var í 1997 í uppskoti til heiðursløn norðurlandaráðsins. Fyri at hjálpa donsku áhoyrunum at skilja yrkingarnar, vóru donsk avrit handaði út. At enda sang Annika Hoydal nøkur løg. Áðrenn Vagn Steen endaði kvøldið og leiðarin í Føroyahúsinum Martin Fjallstein bjóðaði køkur og kaffi.

Sum í eini rættiligari føðingardagsveitslu var stórt kakuborð, og fólk hugnaðu sær ófórt. Kondittarin hjá Føroyahúsinum hevði gjørt sær stóran ómak, og eina løtu kendist tað sum ein veitsla.

## Nýggjar plakatir

Fleiri av føðingardagsgestunum nýttu høvið at ogna sær nýggju Mikines plakatirnar, ið eru prentaðir í sambandi við føðingardagin, og sum fingust til keyps. Samanumtikið var talan um eitt frálíkt tiltak. Sjálvt um húsið einans var hálvfult og áskoðarafjøldin ikki tyktist at fevna so breitt, so tyktust tey, ið høvdu leitað sær inn á Vesterbrogade 17 A sera væl nøgd. Her var talan um listaáhugaði fólk, ið vildu uppliva føðingardagin hjá hesum okkara fyrsta veruliga yrkislistamálara.